## Úr Løgtinginum



## Tríggjar fyrstu viðgerðir

JOHN JOHANNESSEN

Tingfundur nummar 44 hesa tingsetuna varð settur í gjár klokkan hálvgum tvey seinnapartin. Fimm mál vóru á skránni. Av hesum fimm málunum var talan um eina triðju viðgerð, tríggjar fyrstu viðgerðir og framløgu.

Fyrst á skránni var triðja viðgerð av tingmáli nummar 26/199, sum er uppskot til løgtingslóg um flyting av veðhaldi fyri lánum hjá Telefonverki Føroya Løgtings. Uppskotið varð samtykt.

Næsta málið á skránni var tingmál nummar 45/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll. Talan er um mál, sum uppskot, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum vegna landsstýrið legði fyri tingið 25. januar í ár.

Triðja málið á dagsskránni var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 46/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Talan er um uppskot, sum Karsten Hansen legði fyri tingið 25. januar í ár.

Seinasta viðgerðin áðrenn framløgurnar var viðgerð av tingmáli nummar 47/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um ferðslu. Talan er um uppskot, ið Katrin Dahl Jacobsen legði fram vegna Javnaðarflokkin 25. januar.

## Jógvan á ting Jógvan

*Mikudagin tók Jógvan Lützen sæti á tingi fyri Jógvan við Keldu*

JOHN JOHANNESSEN



Á tingfundinum mikudagin tók Jógvan Lützen úr Klaksvík sæti á tingi fyri Jógvan við Keldu. Tingformaðurin boðaði frá skrivi frá Jógvani við Keldu, dagfest 25. januar, tinglimurin úr Klaksvík søkir um farloyvi.

Jógvan við Keldu søkti um farloyvi úr tingarbeiðinum fyri hesa vikuna og nøstu viku, og bað hann um, at næsti maður á lista Fólkafloksins í Klaksvík slapp at taka sæti fyri seg.

Samtykt varð uttan atkvøðugreiðslu, at Jógvan Lützen, ið áður hevur sitið á tingi, skuldi taka sæti fyri Jógvan við Keldu.

Jógvan Lützen fekk til valið í 1998 52 atkvøður á Fólkaflokslistanum í Norðoya valdømi, og fekk hann sostætt fjórðmestar atkvøður á lista Fólkafloksins í Norðoyggjum. Frammanfyri hann vóru Rúna Sivertsen við 114 atkvøðum, Jógvan við Keldu við 220 atkvøðum og Anfinn Kallsberg við 509 atkvøðum.

## Fimm møttu ikki

JOHN JOHANNESSEN

Tríggir av løgtingslimunum, ein landsstýrismaður og rískisumboðskvinnan møttu ikki á tingfundinum mikudagin.

Løgtingsmenninir, ið ikki møttu, vóru Edmund Joensen úr Sambandsflokkinum, Marjus Dam úr Sambandsflokkinum og Sámal Petur í Grund úr Sjálvstýrisflokkinum.

Landsstýrisflokkurin var Signar á Brúnni, landsstýrismaður í mentamálum.

# Leggja einki í Suðuroynna

*Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð, er sera vónbrotin av, at Vinnunevndin ikki kundi semjast um at leggja eitt felags álit um, at ein framtíðar oljuhavn skal liggja í Suðuroynni*

SVEINUR TRÓNDARSON



*Viberg Sørensen er vónbrotin av at Vinnunevndin ikki vildi taka undir við og broyta útbjóðingarlógina soleiðis, at tað kom at standa í lógini, at oljuhavnin skal vera í Suðuroy*

Fyrradagin var Vinnunevndin hjá løgtinginum liðug at viðgera løgtingsmálið um fyrsta útbjóðingarumfar og nakrar tímar seinni var álitið lagt fyri tingið.

Niðurstøðan av nevndarviðgerini var, sum sagt í blaðnum í gjár, at undirtøka ikki fekst fyri at leggja eina framtíðar oljuhavn í Suðuroy. Javnaðarflokkurin stóð einsamallur við sínum broytingaruppskoti, sum tí neyvan verður samtykt.

– Tað var einastandandi keðiligt, at tað hatta skuldi vera endin, men vit boyggja okkum fyri meirilutanum, sigur formaðurin í Suðuroyar Oljuvinnuráð, sum hevur gingið undan í stríðnum fyri at tryggja suðuroyingum oljuvinnuna.

Viberg Sørensen sigur, at hetta bara er enn eitt dømi um hvussu líkaglaðir politikkararnir eru við Suðuroynna.

– Tak til dømis Strandferðsluna. Hon liggur í hálvum gekki og vit kunnu nóg illa fáa eitt avloysaraskip meðan Smyril fer í dokk. Teir siga, at eingir pengar eru tøkir til tað, sigur Viberg Sørensen.

### Fáa vit als einki burturav

Úrslitið av, at tað ikki fekst undirtøka fyri at leggja oljuhavnina í Suðuroynni verður, sambært Viberg Sørensen, at nú verður Suðuroyggin við sviðusoð. Frástøðan til oljuøkini, sum eru í fyrsta útbjóðingarumfari, eru stytst úr Suðuroynni, men, heldur hann, tað tykjast politikkararnir vera fullkomiliga líkaglaðir við.

– Um so var, at oljuhavnin varð løgd her suðuri, so hevði tað givið av sær norðureftir av náttúrligum ávum. Verður oljuhavnin løgd norðanfjørðs, so fáa vit púrasta einki burturav.

*Men hevði vandin ikki verið, at t. d.. øll umsitingin kortini hevði verið í Havn. Umstøðurnar eru munandi betri til tað her norði?*

– Tað er møguligt, men varð oljuhavnin løgd her, so hevði í hvussu er ein partur av umsitingini verið lagdur her, umframt alt annað, sigur hann.

*Men hvat ætla tit tykkum at gera við niðustøðuna hjá Vinnunevndini?*

– Vit kunnu einki gera, tí vit fáa einki gjørt. Suðuroyar Oljuvinnuráð er ikki nakar maktfaktorur, og tí kunnu vit ikki gera annað enn at boyggja okkum fyri meirilutanum, sigur Viberg.

*Men merkir tað so, at tit hava verið ov vánaligir at gera tykkara arbeiði at ávirka politikkararnar?*

– Tað kanst tú kanska siga.

### Samferðslan hevði batnað

Sum nevnt omanfyri, so heldur Viberg ikki nógv um viljan hjá politikkarunum at bøta um samferðsluviðurskiftini hjá Suðuroynni við meginøki.

Gongdin, nú Strandferðslan skal hava avloysaraskip fyri Smyril, hevur ikki gjørt hann veikari í trúnni uppá, at politikkararnir leggja ov lítið í tað sum fyriferst í Suðuroynni.

Tí er hann serliga vónbrotin av, at oljuhavnin ikki verður løgd í Suðuroynni. Tað hevði nevniliga eisini havt við sær, at samferðslan á ein ella annan hátt hevði verið gjørd betri. Virksemið sunnan fyri hevði tá verið so stórt, at politikkararnir høvdu verið noyddir at bøta um samferðsluna við Suðuroynna, og tað hevði gjørt tað meira liviligt har suðuri.

# Grønlendingar spjaða virksemi

*Viberg Sørensen heldur tað verða løgið, at føroyingar, sum liva í so lítlum landi, ikki lata útjaðaran fáa burturav, nú ein nýggj vinna stingur seg upp og vísir á, at grønlendingar eru farnir at miðspjaða*

SVEINUR TRÓNDARSON

Hóast allar súður ikki eru syftar enn, so sær í løtuni út til, at oljuhavnin í fyrsta umfari er gloppin suðuroyingum av hondum. Álitið frá Vinnunevndini hjá løgtinginum ber í hvussu er á tað borðið, og Tað manglar ikki nógv í, at Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð ger tað sama.

– Nú skal mann ikki geva skarvin yvir beinanvegin, men sum tað sær út nú so sær ikki gott út, sigur hann.

Hann vísir á, at tað er ógvuliga tungt at arbeiða Suðuroynni at frama, tí politikkararnir tykjast hava gloymt, at oyggin yvirhøvur er til.

### Ikki allar vónir brostnar

Kortini hevur hann eina vón, um at tingið kortini fer at samtykkja eitt broytingaruppskot, sum Javnaðarflokkurin hevur boða frá, at teir fara at leggja fram.

– Flokkurin hevur sagt, at teir fara at leggja fram eitt broytingaruppskot undir aðru viðger, og tí mugu vit bara krøkja okkara vónir til tað, sigur Viberg.

Um tað uppskotið fer at vinna frama er ikki gott at vita. Fyri einari tíð síðani spurdi Suðuroyar Oljuvinnuráð politisku flokkarnar um teirra ætlanir við oljuvirkseminum, men hugurin at svara var ikki serliga góður.

Onkrir flokkar svaraðu als ikki, meðan aðrir vóru lunkaðir. Kortini svaraður Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin at teir tóku undir við, at oljuhavnin verður løgd í Suðuroynni. Seinni hevur Tjóðveldisflokkurin kortini sagt alment, at flokkurin ikki er samdur um hetta innanhýsis.

– Men hetta er bert eitt tekin um, at politikkararnir skifta meining alla tíðina, so tað er ikki gott at vita, sigur hann.

Hann hevur kortini vónir um at einstakir politikkarar fara um floksmark og atkvøða fyri broytingaruppskoti javnaðarfloksins í tinginum.

### Grønlendingar staðfest trupulleikan

Viberg Sørensen heldur tað annars vera serstakliga løgið, at føroyingar á henda hátt miðsavna alt virksemi um høvuðsstaðarleiðina.

– Tað er eingin lóg, sum sigur, at virksemið skal liggja í meginøkinum, og tað er t. d. beint øvugt av tí, sum grønlendingar gera, tí teir eru farnir at miðspjaða heldur enn miðsavna almenna virksemi, sigur hann.

Í lesarabrævið í m. a. Sosialinum í fyrradagin sigur Viberg Sørensen, at grønlendingar hava staðfest, at skulu teir búgva í Grønlandi, so skulu teir búgva í øllum landinum og ikki bara í einum lítlum parti.

– Hetta er ikki gjørt út frá einari kostnaðarligari støðu, men lívið hevur onnur og størri virðir og tí hava teir lagt á annan bógv.

Tað grønlendingar m. a. hava gjørt er, at flyta t. d. navigatiónsskúlan úr Nuuk til Paamiut, farma- og bingjuumsitingina til Manitsoq, hóast høvuðsbingjuplássið er í Nuuk og alla umsiting av íbúarblokkum og bústaðarplássum úr Nuuk til Sisimiut.

### Suðuroyggin vælegnað

– Og Føroyar er bert ein elalítil brotpartur sammett við Grønland - men her verður miðsavnað sum ongantíð fyrr, sigur Viberg.

Tá vit spyrja Viberg, sum Suðuroyggin hevur neyðugu sosialu umstøðurnar at bjóða einari komandi oljuvinnu sigur hann, at tað fyri so vítt kann vera líka mikið.

– Oljufeløgini siga, at teir í hvørjum einstøkum føri byrja av nýggjum, og tí høvdu tær sosialu umstøðurnar verið óviðkomandi, sigur Viberg, sum kortini leggur dent á, at umstøðurnar í Suðuroynni annars eru avbera góðar.

*Men er tað kortini ikki vandamikið, um tingið nú fer at lóggeva hvar ávíst virksemi skal liggja. Er ikki vandin, at norðoyggjar fara at krevja okkurt líknandi og Vágoyggin tað sama?*

– Nei, tað haldi eg avgjørt ikki, sigur Viberg avgjørdur.

– Hetta hevur nakað við tað at gera, at vinnuligu er Suðuroyggin nógv verri fyri enn restin av landinum, og tað er tann veruligi trupulleikin, sum vit kundu hjálpt nógv uppá, um so var, at oljuhavnin varð løgd her. Tann trupulleikin hava hini økini ikki, sigur Viberg Sørensen at enda.



# – Suðuroyingar verða ikki snýttir

*Hergeir Nielsen sigur, at hóast meiriluti ikki er í Vinnunevndini fyri at leggja oljuhavnina sunnanfjørðs, so hevur hann ikki snýtt oyggjafelagar sínar. Og hann dugir heldur ikki at síggja tað sum eina forðing fyri, at oljuhavnin ikki kortini kann liggja í Suðuroynni*

SVEINUR TRÓNDARSON



*– Suðuroyingar verða ikki snýttir. Men eg eri bangin fyri, at tað kann geva bakslag, um so er, at uppskot Javnaðarfloksins fellur, og tað hevði verið óbótaligur skaði, sigur Hergeir Nielsen*

– Eg havi ikki snýtt suðuroyingar í hesum føri, og eg ætli mær heldur ikki at gera tað. Eg haldi ikki, at tað er rætt, at seta eitt uppskot fram í tinginum - upp á hvamsvís - tí fellur tað, kunnu komandi landsstýrismenn í oljumálum tulkað tað soleiðis, at tingið er í móti at oljuhavnin skal leggjast í Suðuroynni. Og tað er ikki meiningin, sigur Hergeir Nielsen.

Tá Suðuroyar Oljuvinnuráð fyri eini tíð síðan spurdi politisku flokkarnar um teirra støðu til eina oljuhavn í Suðuroy, svaraði Tjóðveldisflokkurin, at teir tóku undir við tankanum.

Seinni kom tó fram, at tað bert vóru partar av flokkinum, sum tóku undir við brævinum, og Hergeir Nielsen hevur alla tíðina sagt, at hann er ein teirra.

Nú lógin um fyrsta útbjóðingarumfar var fyri í vinnunevndini, tók Tjóðveldisflokkurin kortini ikki undir við broytingaruppskotinum hjá minnilutanum til lógaruppskotið.

Hetta broytingaruppskot fær bert undirtøku frá Javnaðarflokkinum, og tað heldur Hergeir gera við politiskum løtuvinningi fyri eyga.

### Tjóðveldisflokkurin er ikki ímóti

Hóast Vinnunevndin í hesum føri hevur valt at standa sum ein maður, so sigur Hergeir Nielsen, at tað ikki merkir, at Tjóðveldisflokkurin er ímóti at oljuhavnin skal liggja í Suðuroynni.

*Skilir tú, um suðuroyingar kenna seg illa viðfarnar av Tjóðveldisflokkinum nú?*

– Nei, tað geri eg ikki. Vit eru sum sagt ikki ímóti, at oljuhavnin verður løgd í Suðuroy, men vit vilja bara tryggja okkum, at møguleikin stendur opin aftaná eisini. Tað skal skiljast soleiðis, at hóast tað ikki verður staðfest í hesum lógaruppskotinum, hvar oljuhavnin skal liggja, so merkir tað ikki, at myndugleikarnir ikki einaferð seinni kunnu geva boð um at hon júst skal liggja í Suðuroynni. Eg kann heldur ikki fara inn og noyða okkara tingmenn at atkvøða sum eg vil hava teir at gera, sigur Hergeir.

Kortini er hann bangin fyri, at um uppskot Javnaðarfloksins fellur, so hava komandi landsstýrismenn møguleikan at siga, at tingið feldi uppskotið um, at havnin skuldi vera sunnanfjørðs, og so avgerða, at hon skal vera norðanfyri.

– Og tað vilja vit fyri alt í verðini sleppa undan, sigur hann.

### Myndugleikarnir avgera staðið

Fólk, bæði í vinnuni og politikkarar eru ymisk á máli, hvørt tað er rætt av politikkarunum yvirhøvur at blanda seg upp í hvar ein framtíðar oljuhavn skal vera. Skilir Hergeir hesa tvístøðu og heldur hann, at tað yvirhøvur er uppgávan hjá politikkarunum at blanda seg í hesum máli.

– Nei, tí skilji eg púrt einki av, og eg haldi, at tað er ein sjálvfylgja at myndugleikarnir avgera hvar oljuhavnin skal vera, sigur Hergeir.

Hann vísir á, at politikkarar avgera so mangt annað í hesum landi, og tí er tað einki løgið í, at teir avgera plaseringina hjá oljuhavnina eisini.

– Fleiri oljufólk hava sagt, at tey heldur vilja hava myndugleikarnar at avgera hvar havnin skal vera, tí so fara teir har hon verður løgd og tað eru greið boð frá vinnuni, sigur Hergeir.

### Sjálvsagt betrar tað um samferðsluna

Viberg Sørensen sigur aðrastaðni í blaðnum í dag, at kom oljuhavnin í Suðuroynni, so var eisini ein vón um, at samferðslan við meginøki fór at batna í framtíðini. Tí spyrja vit Hergeir, um hetta eisini er ein partur av orsøkini til, at suðuroyingar vilja hava fingrarnar í oljuna.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað er ein síðuvinningur, sum allir suðuroyingar høvdu fegnast um. Tú skalt eisini minnast til, at fólk úr oljuvinnuni sjálvari hava sagt, at tey fegin vilja vera við til at fíggja betri samferðslu við Suðuroynna, so sjálvandi er tað ein partur av orsøkini, sigur Hergeir.

Hann leggur kortini dent á, at høvuðsmálið er at fáa lív aftur í virksemi sunnanfjørðs.

– Vit skulu eisini minnast til, at verður virksemi lagt har suðuri, so verður tað útgerðarstøðin og okkurt annað, sum verður avmarkað til Suðuroynna. Restina av tí handilsliga virkseminum fær restin av landinum gagn av, tí eg ivist onga løtu í, at fyritøkur norðanfjørðs vilja sleppa upp í part, sigur Hergeir.

Og tí heldur hann, at tað er skeivt av Javnaðarflokkinum at leggja uppskotið fyri tingið nú.

– Tað kann geva bakslag og tað hevði verið óbótaligur skaði, sigur hann.



# Elverkið í Botni umvælast fyri 14 mió

*Arbeiðið byrjar tann 15. apríl og skal verða liðugt 1. september í ár. Gamla betongrørið verður útskift við stálrør og øll tann elektrotekniska útgerðin á orkustøðini verður skift eisini*

ÓLAVUR Í BEITI

Elsta elverkið í landinum, Eleverkið í Botni í Suðri, sum var bygt í 1921, skal nú setast í stand, og gamla betongrørið við stáli í skiftast við eitt stálrør. Arbeiðið byrjar tann 15. apríl og skal verða liðugt tann 1. september í ár, sambært stjóranum í SEV, Klæmint Weihe.

Øll útgerðin er longu bíløgd, og er tað Møller Energi úr Noregi, sum letur tað 650 metur langa stálrørið, 600 millimetur í diametur, og leggur tað, meðan føroyskar fyritøkur fara at gera annað arbeiði í samband við nýggja rørið, t.d. at stoypa nýggju stabbarnar til rørið frá Rykisvatnið og oman til Elverkið í Botni.

Arbeiðið at útskifta elektroteknisku útgerðina á orkuverkinum verður SEV at standa fyri. Samlaði kostnaðurin av hesi nýgerð av Elverkinum í Botni í Suðri kemur at kosta einar 14 mió. kr.

Elverkið í Botni, sum kom uppí SEV í 1963, letur 5 mió. kWh í miðal árliga, sum er 1/4 av samlaðu nýtsluni í Suðuroynni.

Úrval av føroyskum troyggjum ÷40%

Natúr tógv 10,- kr.

Merc. bummull 10,- kr.

Vanligt bummull 8,- kr.

Frá hósdegi til leygardag lata vit av allari ikki útsøluvøru ÷10%

Vikuskiftistilboð:

Føroyskt tógv 29,- kr.

TÓGVHANDILIN

Sverrisgøta 19 - 100 Tórshavn

Tlf. 315264

sosialurin - 311820